



*Básarnir eru ikki bert til framsýningar, tí allir framsýnararnir hava eisini ein verkstað í básunum, so til ber hjá fólki at síggja, hvussu vøran verður til. Her síggjast básarnir hjá Virkni, við Hildur Hermansen, sum arbeiðir við leiri og Leif Erik Niclasen, gullsmiði*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Handverkslist í Müllers Pakkhúsi

**Jónhild Johannesen og Randi Vang skipa annað árið á rað fyri handverksstevnuni Gluggaglæmu. Hetta er ein framsýning/-sølustevna/verkstaður, har fólk kunnu møta listhandverkarum. Hesuferð er eisini ein kapping við nýskapandi sjalum á skránni**

GLUGGAGLÆMA
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Randi Vang og Jónhild Johannesen fyrireikarar. – Áhugin fyri Gluggaglæmu er sera stórur, bæði fyri at luttaka á básunum og vera við í sjalskappingini. Og tey vitjandi hava higartil verið eini trýhundrað dagliga*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Gluggaglæma er at kalla eitt framhald av tiltakinum Hendur og Hugflog, sum plagdi vera í ítróttarhøllini á Hálsi. Tað vóru eisini tær báðar Jónhild Johannesen og Randi Vang, ið stóðu fyri tí tiltakinum.

– Gluggaglæma er ein sjálvstøðug verkætlan, ein avloysari fyri Hendur og Hugflog. Men hetta er nakað øðrvísi, greiðir Randi Vang frá.

Jónhild tekur um endan, og sigur, at tá tiltakið var á Hálsi, vóru allir luttakarar inni í stóru høllini í tríggjar dagar og vístu ymisku vøruna fram.

– Gluggaglæma verður hildin her í Müllers Pakkhúsi, og her er nógv minni pláss enn tað er í høllini. Tí hava vit nú tvey hold. Annað var frá leygardegi til týsdag og hitt verður frá hósdegi til sunnudag. So fáa bæði holdini eitt vikuskiftið í part, sigur Jónhild.

Hon sigur, at ein stórur munur er eisini , at tað á Gluggaglæmu ikki bert eru framsýningar, men at tað eru verkstøð. Á tann hátt kunnu fólk koma inn, og hyggja hvussu teir ymsu framsýnararnir arbeiða seg fram til úrslitið.

### Kappingar

Í fjør høvdu tær skipað fyri eini kapping, har tann vakrasti handvirkaði vætturin skuldi finnast. Vinnarin var vætturin Álvur, sum tær so skrivaðu eina søgu um.

Í ár hava tær valt at útskriva eina kapping í bundnaturrikløðum og sjalum. Kappingin var útskrivað í januar og freistin var úti um hálvan august.

– Hetta er eitt evni, sum bæði er modernað og søguligt, og sum nógv spennandi kann koma burturúr, sigur Randi.

Tær hava fingið trýssj ymisk sjal inn. – Vit hugsaðu áðrenn, at um vit fingu eini fimtan-tjúgu sjal inn, so høvdu vit verið ógvuliga nøgdar. Og so komu tað ikki færri enn trýssj, so tað var ógvuliga gleðiligt.

Tær hava sett tríggjar dómarar at døma i kappingini. Tær eru Katrin í Gongini, eigari av Klivanum í SMS, Lis Helgadóttir, sum er listahandverkari og Hannelisa Falck, sum er gift til Svøríkis og sum eisini er listahandverkari.

– Tað eru nøkur rættiliga strong kriteriir. Tað skal vera nýskapandi, men samstundis við íblástri frá tí gamla. Tilfarið skal vera føroyskt, og hugt verður at, hvussu tilfarið er brúkt, hvussu væl tær hava fingið burturúr tilfarinum. Og síðani verður hugt at hegni og handverksdygd, greiðir Jónhild frá.

Vinnarin verður funnin síðsta dagin á stevnuni, sum er sunnudagin 12 september

### Endamálið

Tær báðar siga, at endamálið við Gluggaglæmuni avgjørt er at geva framvísarunum mót uppá at halda fram við handverkinum.

– Vit vilja, at hetta er nakað sum skal grógva og gerast størri. Vit vilja geva teimum mót uppá, at gera ítrivið til eina hjávinnu. Við tiltøkum sum Gluggaglæmu, fáa tey ein møguleika at møta kundunum, og at síggja hvussu stórur áhugi er fyri tí, tey gera. Eisini um tey sjálvi hava nakran áhuga í at skapa sær ein vinnuveg av handverkinum. Við hesum fáa tey ein lítlan forsmakk, sigur Randi.

Jónhild leggur afturat, at handvirkaða vøran er nógv meiri persónlig enn hópframleidda vøran er.

– Tey kunnu øll siga tær eina søgu um verkini tey hava at selja. Tú fært eina frágreiðing um hvussu hon bleiv til, tá tú keypir vøruna, tí hetta er alt unikavørur.

Áhugin fyri at vera við er eisini rættiliga stórur. Í Müllers Pakkhúsi rúmast 12 básar inn í senn, og í onkrum bási eru tvey listafólk. Sum áður nevnt er stevnan býtt í tvey, so alt í alt eru nøkur og tredivu fólk við.

– Tað er ógvuliga ymiskt hvat tað eru fyri fólk, ið luttaka. Onkur hevur undirvíst á kvøldskúla í fleiri ár, meðan onkur júst er byrjaður. Onkur kanska hevur hugsað um at lata upp ein handil, og vil tí royna seg her fyrst, greiðir Jónhild frá.

Møguleiki er at keypa framsýndu vøruna, men hon verður ikki latin keyparanum fyrr enn síðsta dagin av Gluggaglæmu.

– Tey, ið koma seinasta dagin, skulu helst eisini hava okkurt at hyggja at, sigur Jónhild.

Gluggaglæma verður sera væl vitjað. Á stevnuni higartil, hava tað verið eini trýhundrað fólk um dagin. Í fjør svingaði talið heilt frá tveyhundrað til omanfyri sekshundrað.

Men tað eru ikki bert básarnir, ið draga fólk. Á Gluggaglæmu verður nevniliga eisini skipað fyri ymiskum tiltøkum. Bæði mótaframsýningar, dansur og café, har alt er heimagjørt eru eisini á skránni í Müllers Pakkhúsi í hesum døgum.



*Umframt básarnar eru bæði mótaframsýningar, dansur og ein bindikapping við evninum »føroysk sjal og bundnaturrikløð« á skránni. Her síggjast dansararnir Jóna, Bjørt og Durita í nøkrum av sjalunum, sum eru við í kappingini*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



# Kappingaravlagandi stuðul til bókaútgávur

**Í Føroyum er tað soleiðis, at nøkur forløg fáa stuðul á Løgtingsins fíggjarlóg til útgávur, meðan onnur fáa tað ikki. Hetta heldur Felagið Føroysk Bókaforløg vera serstakliga kappingaravlagandi, og hevur felagið tískil sent Fíggjarmálaráðnum og Mentamálaráðnum eitt skriv, har víst verður á hesi viðurskiftini**

BÓKAÚTGÁVUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Felagið Føroysk Bókaforløg hevur sent Fíggjarmálaráðnum og Mentamálaráðnum bræv, har víst verður á tað, at nøkur ávís forløg fáa almennan stuðul, er kappingaravlagandi*

– Á løgtingins fíggjarlóg er stuðul játtaður til tvey forløg, meðan onnur ikki eru nevnd. Tað er kappingaravlagandi, tá ið tað sum skuldi verðið grundarlagið fyri allari kapping – nevniliga tað, at víðvøllurin er líka hjá øllum – ikki er galdandi, sigur Zakarias Wang. Hann heldur fram, at tað jú sigur seg sjálvt, at tey, ið fáa stuðul, eru betur fyri enn hini.

Eitt av limafeløgunum í Felagnum Føroysk Bókaforløg hevur vent sær til Kappingarráðið og klagað um verandi støðu. Svarið, sum felagið fekk, var, at kappingarráðið helt ikki, at tað kundi blanda seg upp í dispositiónir, sum Føroya Løgting ger.

– Um tað er rætt, veit eg ikki, men tá Løgtingið kemur við játtanum, skuldi ein trúð, at hetta var sambært galdandi lóggávu annars, heldur Zakarias Wang.

Hann vísir á, at í kappingarlógini stendur, at øll kapping skal vera jøvn, men tað ivast hann stórliga í, um hon er á bókaútgávuøkinum, tá nøkur forløg frá pengar framíhjá frá tí almenna.

### Góðar vónir

Zakarias Wang sigur, at orsøkin til, at felagið hevur sent skriv til myndugleikarnar er, at felagið vil gera vart við hendan mismun. Og hann heldur, at tað var so líka til at venda sær til teirra, ið eru við til at gera fíggjarlógina.

Vónirnar hjá felagnum um, at brævið verður tikið til eftirtektar, eru góðar, sambært Zakariasi.

Brævið varð sent teimum limum í Felagnum Føroysk bókaforløg, sum eru nevnd á Løgtingsins fíggjarlóg, men tey søgdu seg ikki vera samd í brævinum.

Hvat tað var, sum tey ikki vóru samd í, fekst sambært Zakariasi ongantíð at vita.

### Stuðul til øll

Zakarias sigur, at við stuðuli frá tí almenna er ongin ivi um, at tað koma nógvar føroyskar útgávur á marknaðin. Hann sigur, at um løgtingið vil hava nógvar føroyskar útgávur, so skal stuðul til, men á ein ikki kappingaravlagandi hátt.

Zakarias er ikki í iva í, at um almenni stuðulin til bókaútgávur, verður latin til øll útgávuforløg, at so verða tað nógv fleiri føroyskar bøkur.

– Eg dugi ikki at síggja nakað til hindurs fyri, at vit kundu sæð upp til dupult so nógvar útgávur á føroyskum, sigur hann.

– Privatu forløgini geva sum er nógvar bøkur út, so tað er ikki torført at ímynda sær ein munandi vøkstur í útgávutalinum við einum ikki kappingaravlagandi stuðli, leggur hann afturat.

Skúlabókagrunnurin:

# Sjónarmiðið heldur ikki

**Helena Dam á Neystabø, stjóri á Skúlabókagrunninum, heldur, at tað er ein sera óheppin gongd, um tekin um, at privat og almenn forløg eru kappingarneytar byrja at koma fram. Sjónarmiðið um kappingaravlagandi stuðul heldur ikki, tí økið hjá Skúlabókagrunninum er fyri tað mesta skúlabøkur**

BÓKAÚTGÁVUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Helena Dam á Neystabø, stjóri á Skúlabókagrunninum, sigur, at sjónarmiðið um kappingaravlagandi stuðul til bókaútgávur heldur ikki, tí økið hjá Skúlabókagrunninum er fyri tað mesta skúlabøkur*

*Savnsmynd*

– Sjónarmiðið um, at stuðulin, sum vit fáa, er kappingaravlagandi, heldur ikki, sigur Helena Dam á Neystabø, stjóri á Skúlabókagrunninum.

Hon vísir á, at tey flestu vita, at stuðulin til skúlabøkur fer til tilfar, sum allatíðina skal bróta upp úr nýggjum.

– Vit skulu sjálvi evna eitt fakmál til og innihaldið í bókunum skal samsvara við undirvísingarpolitikkin her í landinum, sigur hon. Harafturat eru ongir rithøvundar, sum burturav liva av at gera undirvísingartilfar, og tí kann tað vera ein langur vegur at fáa eina heila bókarøð út við føroyskum undirvísingartilfari.

### Kontinuitet

Helena vísir á, at tá talan er um undirvísingartilfar, er neyðugt, at ein ávísur kontinuitetur er.

Sum dømi nevnir hon støddfrøðisbókarøðina, sum tað hevur tikið grunninum 20 ár at fáa til vega til allar árgangirnar í fólkaskúlanum.

– Hvørji privat forløg høvdu sett seg før fyri tí, spyr hon og vísis samstundis á, at bæði í Danmark og Íslandi verður tosað um, at skúlabókamarknaðurin er ov lítil fyri tey privatu forløgini.

– Ongin forðar teimum í at koma inn á hetta økið, men spurningurin er bara, um vit so høvdu kunnað tryggjað tøkt tilfar, um nú øll forløg fara at kríggjast um tær somu krónurnar, sum millum annað skulu nýtast til føroyskt undirvísingartilfar, sigur hon.

### Samstarv

Helena heldur tað vera sera óheppið, um tekin nú verða send út, um at klandur er millum forløgini.

Ei heldur heldur hon, at tað er rætt, at Skúlabókagrunnurin og Bókadeild Føroya Lærarafelags verða sædd sum tey, ið vilja teimum privatu forløgunum til lívs.

– Eg kann svara fyri okkum øll her, at vit so avgjørt vilja virka fyri einum so breiðum og fjølbroyttum grundarlagi fyri bókaútgávum sum til ber, sigur hon.

Hon leggur afturat, at um ein fer at hugsa sær, at øll skulu hava part í somu krónum, so verður tað torført at tryggjað undirvísingartilfar, sum samvarar við galdandi reglum. Og at forløg so smátt byrja at taka grundarlagið undan hvørjum øðrum í staðin fyri at samstarva.

– Eg vænti, at allir partar missa, og at stórur skaði kann standast av hesum So hevði tað verið munandi betur at samstarva og roynt at stimbra til dømis mentunargrunnin, heldur Helena Dam á Neystabø, stjóri á Skúlabókagrunninum.

## Streymurin vendi

Ábendingar eru um, at elnýtslan í Føroyum er minkað. Í august mánaði í fjør brúktu føroyingar 20.729 megawatttímar av ravmagni, men um sama mundið í ár er nýtslan 19.674 megawatttímar. Hetta er ein minking upp á fimm prosent.

– Lítið er at ivast í, at tað serliga er vinnan, sum brúkar munandi minni av streymi nú enn frammanundan. Í alivinnuni, sum seinastu árini støðugt hevur brúkt meira streym, gongur skeiva vegin, og virksemið innan flaka-vinnuna er eisini broytt. Hetta kennist nú í hagtølum okkara, sigur Klæmint Weihe, stjóri í SEV.

Ravmagnsnýtslan er annars væl vaksin seinnu árini. Frá 1999 til 2003 hevur vøksturin verið upp ímóti einum fjórðingi, 23 prosent. Men nú er streymurin vendur, og tað byrjar at ganga niðureftir.

**-hkm**